## Maersk gevst

Fyri seinastu ferð kemur eitt rutuflogfar hjá Maersk Air í Vágarnar. Danska flogfelagið hevur gjørt av, at tað gevst at flúgva til Føroya, eftir at tað hevur røkt leiðina heilt og lutvíst í 33 ár.

Stjórin í Maersk Air, Finn Øelund, viðurkennir, at bonusskipanin hjá felagnum var ein høvuðsorsøk til, at felagið mátti gevast at flúgva til Føroya. Bonusskipanin noyddi fólk at velja flogfelag, og føroyingar valdu Atlantsflog í so stórum tali, at tað sveið hjá Maersk.

## Føroyingur til Everton

16 ára gamli Johan Troest Davidsen úr Runavík skrivar undir trý ára sáttmála við enska felagið Everton. Tað er ein dreymur, sum nógvir ungir fótbóltsspælarara hava, sum verður veruleiki hjá Johan.

– Eg havi vant miðvíst leingi, og serliga tey seinastu trý til fýra árini havi eg vant sera nógv. Í veruleikanum havi eg vant alt tað, sum eg havi verið førur fyri, sigur Johan Troest Davidsen.

## Nýtt sjúkrahús

Nýggi bygningurin á Landssjúkahúsinum verður tikin í nýtslu, og hetta verður hátíðarhildið. Landsstýrismaðurin við heilsumálum heldur røður og leggur dent á týdningin hjá sjúkrahúsverkinum.

– Heilsan skal hava eitt trygdarnet, sum virkar. Á hesum øki skulu meskarnir vera ov smáir, heldur enn ov stórir. Og eitt sjúkrahúsverk fyri øll er ein av grundsúlunum í tí samfelag, sum tey flestu av okkum munnu ynskja, segði Hans Pauli Strøm.

## 12 ára gomul vinnur hús

Størsti vinningurin nakrantíð í eini lutaseðlasølu í Føroyum var upp á spæla, tá ið HB Stuðlar burturlutaðu eina íbúð í Havn. Tað gjørdist tann 12 ára gamla Marita Thorsteinsson úr Havn, sum vann høvuðsvinningin. Hon hevði keypt seðilin frá pápa sínum, Hera, sum hevði fingið ein bunti at selja. Íbúðin hjá Maritu liggur á Berjabrekku í Havn.

# OKTOBER

# Profetur vitjaði

**Í meira enn 20 ár hevur Gud talað til heimin gjøgnum egyptisku kvinnuna Vassulu Rydén. Og hesi árini hevur hon ferðast verðina runt og hildið meira enn 800 fyrilestrar. Nú kom til Føroya við einum boðskapi um frið og samstarv**



*Vassulu Rydén vitjaði í bispagarðinum, áðrenn hon skuldi halda talu í Vesturkirkjuni í Havn. Har tók Hans Jákup Joensen, bispur ímóti*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vassulu Rydén segði seg vera komin til Føroya fyri at bera boðskapin víðari frá Gudi, sum tosar gjøgnum hana.

– Eg fari at greiða frá hvussu mítt lív varð, áðrenn Gud tosaði við meg fyrstu ferð, og hvussu mítt lív hevur verið eftir hetta. Eg fari at siga frá øllum tí, sum er komið frá Gudi hesi 20 árini.

Vassulu heldur, at hennara uppgáva er ikki at sannføra nakran.

– Mín uppgáva er at vera boðberi.

Uppá fyrispurning hví fólk skulu trúgva, at hon er ein profetur, nú tá so mong onnur fólk eisini siga seg tosa við Gud, sigur Vassulu, at hetta er nakað, sum fólk mugu meta um sjálvi við at kanna hennara fortíð og lív og tað, sum hon hevur borið víðari fram frá Gudi. Tá kunnu fólk so døma ella meta um seg.

### Liva í friði

Hvat er høvuðsboðskapurin?

– Tað er at liva í friði við Gud og skapa frið millum manna. Tað er ein sannroynd, at kirkjunar standa ikki saman í dag. Gud vil, at tær at semjast og virka saman. Gud veit, at dialogur er millum leiðararnar innan tær ymsu kirkjurnar, og hann heitir á tær um at finna og standa saman. Hetta er ein av høvuðsboðskapunum, men Gud vil eisini hava meg at siga fólki, hvat tað vil siga at liva eitt lív saman við Gudi. Hann vil eisini í samband við øll vanlig fólk, sum eg sjálv eri, og vil hava okkum at skilja seg.

Vassulu sigur, at Jesus er Gud. Hon sigur, at tað hava verið nógvir falskir profetar. Ein má skilja millum hesar og veruligar profetar.

– Vit hava Bíbliuna. Hon er liðug skrivað. Men Gud fer ongantíð at gevast at tosa við okkum. So hann heldur fram at tosa við fólk og velur út tey, sum hann heldur skulu bera boðskapin víðari. Vassulu sigur víðari, at hennara uppgáva er ikki at finnast at, døma ella krevja nakað av nøkrum. Gud er á lívi, og hann er okkara dómari. Seinasta dagin verða vit øll dømd av honum, so vit hava ongan rætt til at døma hvørannan, sigur Vassulu.

### Fólk kunnu velja at trúgva

Vassulu Ryden sigur, at hon metir seg sum eitt vanligt menniskja, sum hevur bæði bein á jørðini, men sum hevur móttikið eina gávu frá Gudi, og tað er hana, sum hon ber fram til onnur. Hans Jákup Joensen, bispur er rættiliga fegin um at hava fingið vitjan av hesi dámliga og spennandi kvinnuliga profetinum, sum hann heldur vera eitt vanligt og lítiðlátið menniskjað. Hann sigur, at hon er sera áhugaverd at hoyra.

Men hvat sigur hann til eina slíka kvinnu, sum sigur, at Gud tosar gjøgnum hana. Onkur vil kanska siga, at tað er blasfemi, tá slíkt kemur fram:

– Tað segði man væl eisini um Jesus. Men við Vassulu er tað soleiðis, at hetta er nakað, sum hon fær og ikki biðjur um. Hon fær nakað, sum hon fær boð um at bera fram og so kunnu fólk velja at lurta ella trúgva tí , um tey vilja. Eg fari at lurta og í spenningi. Hetta er eitt sindur óvanligt fyri okkum. Tað er ikki heilt ókent tað Jesus segði við lærusveinarnar, at "eg havi so nógv annað at siga tykkum, men tað tola tit ikki nú. Men tá Heilagi Andin kemur, so skal hann sannføra osfr. Tað, sum Vassulu sigur, nýtist tí ikki at vera í stríð við tað sum er, tað kann vera í samsvar við tað, sigur bispur.

> » Hava fólk sagt við hvønnannan, at tey vilja liva saman, hava børn og hús, eru tey eftir mínum tykki vígd fyri bæði Gudi og manni, hóast tey ikki eru vígd formelt. Hetta er eisini galdandi fyri tey samkyndu. «
>
> *– Kjartan Mørkøre, fyrrverandi prestur*

> » Fólk, sum eta ósunt, gera tað tíverri ofta í góðari trúgv. Tey vita ikki betri, tí ongin hevur fortalt teimum tað. Tí má fremsta uppgávan hjá politisku myndugleikunum vera, at seta í verk skipaða fólkaupplysing um heilsugóðan mat. «
>
> *– Ulla Sissel Brandi, kostráðgevi*

**HB vinnur triðja árið á rað føroyameistaraheitið í mansfótbólti. Elsta felagið í landinum, TB, flytir uppaftur í 1. deild.**